VEÐRIÐ

Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið



Veðrið í morgin:
Hvassur vindur ella skrið av landnyrðingi og ælingur, partvís kavi. Hitin millum 1 og 4 stig.



Veðrið leygardagin:
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av norði, seinnapartin minni vindur av ymsum ættum. Yvirhøvur turt og sólglottar og hitalagið millum ÷2 og +1 stig.



Veðrið sunnudagin:
Andøvsgul upp í ein strúk av suðri og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitalagið millum ÷1 og +2 stig.

Veðrið mánadagin og týsdagin:
Mánadagin hvassur vindur ella skrið av suðri og útsynningi og ælingur. Hitin millum 4 og 7 stig. Týsdagin hvassur vindur av útnyrðingi og ælingur, partvís kavi. Hitin beint omanfyri frostmarkið.

Sonja vann flatskermin

Hepni vinnarin í sudoku-kappingini fyri oktober mánaða er nú funnin. Tað gjørdist Sonja Mikkelsen í Havnini, sum vann flatskermin frá LM-handlinum.

Sonja Mikkelsen gjørdist hepni sudoku-vinnarin fyri oktober mánaða, og hon hevur vunnið ein flatskerm frá LM-handlinum.

SUDOKU

Teitur Joensen
teitur@sosialurin.fo

Í oktober høvdu fólk møguleika at vinna ein flatskerm frá LM-handlinum í sosialinum. Tey skuldu loysa sudoka uppgávurnar, sum standa í blaðnum, og so vara bara at senda loysnirnar inn til sosialin.

Nógv fólk vóru eisini áhugaði í flatskerminum, tí sera nógv høvdu sent teirra loysnir inn til sosialin. Hepni vinnarin gjørdist Sonja Mikkelsen úr Havn, og hon gleðist um flatskermin.

- Eg loysi sudoku í sosialinum hvønn dag, og hetta havi eg gjørt, líka síðani sosialurin byrjaði at hava sudoku. Tí er sjálvandi stuttligt at hava vunnið ein flatskerm. Vit eiga ein flatskerm sum er, men vit høvdu brúk fyri einum nýggjum, og tí kom hetta væl við, sigur Sonja.

Nú er sudoku í oktober liðugt, men í november verður aftur sudoku í sosialinum, og tá vera nýggir vinningar á skránni.

Hesaferð kunnu øll, sum senda teirra loysnir inn til sosialin, vinna tvey ur frá Klokkuni í SMS. Eitt til konufólk og eitt til mannfólk, og urini hava eitt virði á 1000 kr. hvørt.

Hitalagið kring knøttin

Illulisat	0
Nuuk	0
Qaqortoq	7
Ammassalik	--
Saint John's	--
Halifax	--
Reykjavík	-2
Seyðisfjørður	1
Tórshavn	4
Lerwick	5
Aberdeen	7
London	14
Tromsø	--
Bergen	8
Oslo	--
Stokkhólm	11
Keypmannah.	11
Helsinki	-1
Moskva	3
Berlin	13
Warzawa	8
Kiev	3
Bukarest	6
Paris	14
Madrid	20
Róm	20
Malorca	23
Athen	--
Malta	22
Tunis	24
Beijing	19
New Dehli	28
Bangkok	33
Jakarta	31
Sydney	--
New York	20
Miami	28
Los Angeles	16
Meksikobýur	21
Panama	25
La Paz	15
Rio de Janeiro	---
Buenos Aires	22

LUFTTRÝSTIÐ



Í gjár:
Eitt lágtrýst, 974 hPa. við Hetland fer norðureftir og dýpist. Eitt annað lágtrýst, 970 hPa. í útsynning úr Føroyum fer í landsynning.



Í dag:
Lágtrýstið sunnan fyri Føroyar stendur mestsum í stað og grynnist.

HITALAGIÐ



Hitalagið mált frá 12/10 kl. 06^{00}– 13/11. 06^{00}. Hitin í gjár: 6,4° Minsti hiti máldur í november: - -7,2° - Mesti hiti máldur í november: 12,2°

AVFALLIÐ



Avfallið: 0,0 mm – mált frá 17/10 kl. 06^{00}– 18/10 kl. 06^{00} Avfallið higartil í oktober: 0,0 mm

javni
– Virkin og virðismikil
www.javni.fo

GEVið BLÓÐ

www.sosialurin.fo

VESTFALLSKYRRINDI

12. november Seinna kvarter
15. november Mánin longst frá jørðini
20. november Tendring

Kelda: Almanakkin 2006

Dagur	Suðuroyar-/Vágafirði fp.	Suðuroyar-/Vágafirði sp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði fp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði sp.	Hestfirði/Sundalagnum fp.	Hestfirði/Sundalagnum sp.	Vestmanna-sundi fp.	Vestmanna-sundi sp.	Mykines-firði fp.	Mykines-firði sp.	Nólsoyar-firði fp.	Nólsoyar-firði sp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi sp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi fp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi sp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði sp.	Hvanna-sundi fp.	Hvanna-sundi sp.	Fugloyar-firði fp.	Fugloyar-firði sp.
15. Nov.	02.39	14.58	01.39	13.58	01.54	14.13	04.39	16.58	05.39	17.58	00.54	13.13	-	12.13	02.54	15.13	03.54	16.13	02.24	14.43	03.39	15.58
16. Nov.	03.14	15.31	02.14	14.31	02.29	14.46	05.14	17.31	06.14	18.31	01.29	13.46	00.29	12.46	03.29	15.46	04.29	16.46	02.59	15.16	04.14	16.31
17. Nov.	03.47	16.04	02.47	15.04	03.02	15.19	05.47	18.04	06.47	19.04	02.02	14.19	01.02	13.19	04.02	16.19	05.02	17.19	03.32	15.49	04.47	17.04
18. Nov.	04.21	16.39	03.21	15.39	03.36	15.54	06.21	18.39	07.21	19.39	02.36	14.54	01.36	13.54	04.36	16.54	05.36	17.54	04.06	16.24	05.21	17.39
19. Nov.	04.58	17.18	03.58	16.18	04.13	16.33	06.58	19.18	07.58	20.18	03.13	15.33	02.13	14.33	05.13	17.33	06.13	18.33	04.43	17.03	05.58	18.18